


www.oljan.fo

**Jan Müller** 09 - 03 - 2012

# DONG-stjóri - Haldgott úrslit í 2011

Júst sum teir donsku ríkisgrannskoðararnir hava kunngjørt, at teir hava illgruna um oyðsl í orkufelagnum Dong, og at tað verður kannað, almannakunnger felagið ársroknskapin fyri 2011. Sambært donskum miðlum er roknskapurin vánaligur, men stjórin í felagnum heldur úrslitið er haldgott. Roknskapurin vísir, at umsetningurin vaks 2,2 milliardir krónur í fjør samanborið við 2010 og komupp á 56,8 milliardir krónur. Hinvegin gjørdist nettoavlopið í fjør 2,9 milliardir krónur, sum var 1,6 milliard krónur minni enn árið fyri. Leiðslan sigur í viðmerking til roknskapin, hon roknar við at tvífalda avlopið hetta til 2015 samanborið við úrslitið í 2009. Felagið væntar, at úrslitið í ár verður á leið tað sama sum í fjør, men at úrslitið frá 2013 og frameftir verður munandi betri enn í árunum 2010 til 2012. Anders Eldrup, stjóri í Dong skýrir úrslitið hjá fyritøkuni haldgott og er bjartskygdur um framtíðina. DONG er eitt av útlendsku oljufeløgunum, sum hevur leitiloyvi í Føroyum. Felagið hevur verið partur av leitingini, síðani oljufeløg komu til Føroyar miðskeiðis í 90-unum at gera kanningar. Felagið verður við til at bora ein brunn á landgrunninum í 2014 saman við Statoil og OMV.